


# Brian Kerr valt sínar stríðsmenn

**Brian Kerr, landsliðsvenjari, hevur sett nøvn á leikararnar, sum skulu umboða Føroyar í undankappingardystinum í Estlandi hin 11. august í ár**

Tróndur Arge

Millum teir meira óroyndu í landsliðssamanhangi, ið hava fingið afturval, eru HB leikarnir Tórður Thomsen og Rógvi Poulsen og ÍF liðskiparin, Høgni Zachariasen. Súni Olsen hevur ikki spælt nógv í seinastuni, so tað er óvist hvussu nógv hann kemur at taka lut í hesum landsdystinum. Hann sat yvir, tá Víkingur á Ólavsøku vann á B36 í Gundadali.

## Oddaliðini flest umboð

Tey bæði feløgini, ið eru best umboðaði á landsliðnum eru eisini tvey tey fremstu í landskappingini, NSÍ og HB, við hvørsínum fimm leikarum. Av teimum tjúgu eru fimm útisetar, ið eru Atli Danielsen, Christian L. Holst, Jóan Símun Edmundsson, Gunnar Nielsen og Atli Gregersen.

## Hava spælt ímóti Estlandi fyrr

Føroyar hava fyrr spælt ímóti Estlandi. Tveir teir fyrstu dystirnair vóru venjingar dystir, ið vóru leiktir í 1996 og 1997. Tann fyrri endaði við 2-2 javnleiki, meðan Føroyar vann seinna dystin 2-0 í Tartu í Estlandi. Tí vóru vónirnr góðar, tá føroyska landsliðið tann 4. juni í 1998 fór til Estland í fyrsta EM undankappingardystinum í bólki 9. Vit fingu málmannin útvístan og alt endaði við einum kn+úsandi 5-0 tapi. Retur dystin á Tórsvølli taptu við 2-0.Í juni í 2008 spældu vit aftur venjingardyst ímóti Estlandi. Eftir hálvantíma av dystinum í Tallin var Estland á odda 3-0, men við tveimum málum frá Christian L. Holst og einum brotssparki frá Súna Olsen, javnaði føroyska landsliðið. Eitt korter fyri tíð skoraði Estland til endaliga úrslitið 4-3 til heimaliðið.

## Teir, sum eru úttiknir, eru:

**HB:** Fróði Benjaminsen, Símun Samuelsen, Vagnur M. Mortensen, Rógvi Poulsen, Tórður Thomsen
**NSÍ:** Bogi Løkin, Jóhan Troest Davidsen, Einar Hansen, Jann Ingi Petersen, Christian Høgni Jacobsen
**B36:** Jónas Tór Næs, Christian R. Mouritsen
**EB/Streymur:** Egil á Bø
**ÍF:** Høgni Zachariasen
**Víkingur:** Súni Olsen
**Roskilde:** Atli Danielsen
**Silkeborg:** Christian L. Holst
**Newcastle:** Jóan Símun Edmundsson
**Tranmere Rovers:** Gunnar Nielsen
**Ross County:** Atli Gregersen

## Sjálv ferðin til Estland

Ferðalagið fer úr Vágum 8. August til Keymannahavn, har gist verður á Quality Hotel í eina nátt. Síðani verður farið til Tallin í Estlandi morgunin eftir. Í Estlandi býr føroyska landsliðsferðalagið í Meriton Grand Conference & Spa Hotel. Morgunin eftir dystin mikudagin 11. august gongur leiðin til Keymannahavn áðrenn ferðalagið kl 10.05 hósmorgunin lendir í Vágum aftur.

## Kunnu vit gera tað betri – 12 ár seinni?

Hetta er samstundis fyrsti dysturin í undankappingini til EM endaspælið í Pólandi og Ukraina, 12 ár eftir knúsandi 5-0 ósigurin fyri júst Estlandi í fyrsta undankappingardystinum til EM endaspælið í Hollandi og Belgia – so er spurningurin um vit kunnu gera tað betri hesaferð.

# NM-kapping fyri U17 landslið

NM-kapping fyri U17 landslið verður hildin í komandi viku í Finnlandi. Føroyska liðið skal í bólkaspælinum royna seg móti Norra (3. aug), Svøríki (4. aug) og Skotlandi (6. aug). Umframt dystirnar í bólkaspælinum skulu U17 dreingirnir spæla plaseringsdyst sunnudagin 8. august.

Áki Johansen, venjari, er spentur uppá avbjóðingina og metir, at føroyska liðið er sera væl fyrireikað til kappingina, eftir at teir vóru í Newcastle og Aberdeen fyrr í mánaðinum.

## Leikararnir, sum eru úttiknir til NM-kappingina, eru hesir:

**HB:** Bárður Skorheim Guttesen, Rói av Fløtum, Kári Hvannastein, Ári Mohr Danielsen
**B36:** Rasmus Dan Sørensen, Jákup Højgaard
**B71:** Marcus Klementsen, Brandur Olsen
TB: Teitur Olsen, Ragnar Tausen
**B68:** Haraldur Højgaard
**EB/Streymur:** Allan Hansen
**FC Suðuroy:** Brandur Suðuroy
**ÍF:** Arnold Kristiansen
**MB/07 Vestur:** Jákup Sveinbjørn Olsen
**OB:** Magnus Egilson
**Oure:** Eli Nolsøe Leifson
**Varde IF:** Andrias H Eriksen